**út at koyra**



## Mercedes Benz

Daimler Chrysler eigur Mercedes Benz. Teir eru partaeigarar í koreanska SsangYong, hava samarbeiðsavtalur við VW og Mitsubishi um menning og sølu, keypa ventilar frá BMW, og motorar frá Mitsubishi og VW. Eisini selja teir chassis til Porsche og motorar til SsangYong og Mitsubishi.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**



## Ford keypt Land Rover

Tá BMW lýsti Rover til sølu, søgdu teir at Land Rover ikki skuldi seljast. Men nú hevur Ford keypt Land Rover, sum hevur givið yvirskot í fleiri ár.

**Kelda: Motor Magasinet**



## Suzuki Alto er ársins bíligasti bilur

Suzuki Alto vann kappingina um at verða „Årets billigste bil" skrivar blaðið, Penge & Privatøkonomi, í seinastu útgávuni. Blaðið hevur roknað út hvat tað kostar at hava bil í trý ár og 45000 km, við bensinútreiðslum, service, viðlíkahaldi, árligum eigaraavgjaldi og avskrivingum.

**Kelda: Motor Magasinet**



*Gunnar Hansen (1914-1968) var ein fjølbroyttur handilsmaður, sum kundi selja alt frá bókum til gamalt jarn, og frá chokolátu til jarnbreytaskinnarar.*

# Fjølbroyttur handilsmaður

*Gunnar Hansen hevði umboð fyri Mercedes, DKW og NSU bilarna*

MAGNUS GUNNARSSON

Gunnar Hansen má metast sum ein sera fjølbroyttur handilsmaður, hann kom til Føroyar í 1948 sum bókasølumaður. Tað vísti seg, at hann kundi selja alt frá bókum til gamalt jarn, og frá sjokolátu til jarnbreytaskinnarar.

### Keypur skip til upphøggingar

Gunnar Hansen var dani, føddur 23. oktober 1914 í Holeby á Falster.

Hann var útbúgvin bilsmiðjur og kom til Føroyar í 1948 sum bókasølumaður. Hann sá beinanvegin fleiri møguleikar her í landinum, tí skjótt fór hann at keypa og selja gamalt jarn.

Hann búsettist her og giftist við Annbritt Højgaard, dóttir Hans Jacob Højgaard, lærara og tónaskald. Tá Seinni Heimsbardagi var av, vísti tað seg, at eftirspurningurin eftir jarni var sera stórur, og Gunnar Hansen keypti fleiri skip til upphøggingar.

Millum annað keypti hann fleiri hvalabátar og farmaskipið "Barjama" sum fór á land út fyri Kirkjubø í 1952. Tey flestu skipini blivu løgd við bryggju og fyri ein part avmonterað, síðan send av landinum sum gamalt jarn.

### Bilar, motorsúkklur og knallertir

Miðskeiðis í fimtiárunum fór hann at selja bilar, motorsúkklur og knallertir.

Hann fekk aðalumboð uppá Mercedes Benz, DKW Auto Union, Fiat og NSU.

Mercedes-Benz vóru brúktir sum hýruvognar, vørubilar hjá handilsfyritøkum og bussar til rutukoyring millum bygdir. DKW og NSU vóru mest seldir sum privatbilar.

Vit í Føroyum høvdu nokk einki kelinavn til DKW bilarnar. Í Týsklandi høvdu DKW bilarnir kelinøvn sum "Das Kleine Wunder", danir kallaðu teir "Det Kørende Wækkeur", sum kom av tí eyðkenda ljóðinum frá 2-taktmotorinum.

Innan motorsúkklur, scootarar og knallertir hevði Gunnar Hansen fleiri umboð, so sum MZ, Triumph, Suzuki, Heinkel, NSU, Derby.

Fyrstu tíðina, áðrenn Frits Jensen bygdi nýggju Esso servicustøðina í Gundadali, høvdu hann og Gunnar Hansen samstarv um tænastuveitingar á verkstaðnum hjá Sigird av Reyni niðri í Rættará.

Tá Frits Jensen fekk aðalumboð uppá Fiat bilarnar, helt samstarvið teirra millum uppat. Seinnu árini varð avtala gjørd við bilverkstaðin hjá Edvin Hammer. Sølan av bilum og eykalutum var heima hjá Gunnar Hansen í Lucas Debesargøtu.

### Góðgæti og køliútbúnaður

Gunnar Hansen seldi Gram køliútbúnað og leveraði stór anlegg til m.a. Landssjúkrahúsið og fleiri flakavirkir, eisini hevði hann heilsølu av Toms, Anthon Berg og Galle&Jessen góðgæti. Hann leveraði jarnbreytaskinnarar til havnaútbyggingina hjá Tórshavnar Havn, til teir stóru havnakranarnar at koyra á.

Gunnar Hansen andaðist í havn 20. oktober í 1968 næstan 54 ára gamal. Eftir tað helt konan, Annbritt Hansen fram við heilsøluni. Poul Gaard Hansen, sum hevði arbeitt har nøkur ár framman undan, kom aftur í starv, og var har til hann fór frá vegna aldur.

Tann 15. november 1997 varð lýst í bløðunum við at heilsølan, P/F Gunnar Hansen, gavst og tey takkaðu viðskiftafólkum sínum fyri gott samstarv.

**Keldur: Bent Jacob Hensen og Annbritt Hansen**



*Poul Gaard Hansen keypti ein Mercedes 180 hýruvogn í 1956. Eisini arbeiddi hann hjá Gunnar Hansen í mong ár. Her er Poul saman við bróðursynunum, Jóan Paula, Sigurd Heðin og Mikkjal*

Myndatekstur






**út at koyra**



# Citroén fingið sín egna Picasso

*Citroën bilur uppkallaður eftir heimskenda listamanninum, Picasso*

MAGNUS GUNNARSSON

Citroën Xsara Picasso er ein midi MPV, har konstruktørarnir hava lagt dent á at gera ein elegantan og annarleiðis bil, sum skal liva upp til listamannin, hann er uppkallaður eftir. Bert tíðin kemur at vísa um tað eydnast, men t.d. í Danmark hava fleiri bílagt sær bilin áðrenn hann kom á marknaðin.

### Samarbeiði við Picasso familjuna

Citroën havur goldið nógvar milliónir fyri at fáa loyvi at brúka undirskriftina hjá heimskenda listamanninum til Xsara Picasso.

Listamaðurin, Pablo Picasso, livdi frá 1881 til 1973, tá hann andaðist, 92 ára gamal. Ilt er at siga um honum hevði dámt at ein bilur bleiv uppkallaður eftir honum, og hvat hann hevði hildið um útsjóndina á hesum bilinum. Picasso familjan hevur eftir egnum ynski samarbeitt við Citroën um Xsara Picasso.

### Størri trivnaður innan

Í grundini er Xsara Picasso ein Citroën Xsara við fimm setrum. Innan er dúrkið heilt slætt, og lætt er at flyta seg runt í kabinuni. Viðførisrúmið er stórt og lessihæddin er lág. Øll setrini eru líka breið, og stólaryggurin á tí mittasta setrinum aftan, kann leggjast framyvir og brúkast til borð, samstundis sum setrið kann førkast 14 cm frameftir, so borðið verður lættari at brúka.

»Størri trivnaður innan« hevur verið lyklaorðið hjá teimum, sum hava konstruerað bilin. Tað merkist eisini tá man koyrur bilin. Picasso er lættur at koyra, og koyrieginleikarnir eru sera góðir, sum vanligt er í fronskum bilum.

Panelgearið virkar væl, instrumentini eru í miðjuni á instrumentborðinum, har eitt display sigur frá hvussu langt vit hava koyrt, meðal brennievnisnýtsla, hvussu nógv brennievni er eftir, meðalferð og ferðpilot. Aftan er eisini gott at sita, setrini eru góð og lítið ljóð hoyrist inn í bilin.

### Diesel motorurin kemur seinni í ár

Bilurin fæst einans í einari útgávu, hvat útgerð viðvíkur, men møguleiki er fyri at bestilla eykaútgerð eftir ynski. Tveir bensinmotorar eru at velja í: 1.6i og 1.8i við 16 ventilum, og ein 2.0 HDi Common Rail, Turbo Diesel motorur kemur seinni í ár.

Standard útgerðin er til dømis ABS bremsur við elektroniskari regulering av bremsukraftini, dupultan airbag og síðuairbag, allar 5 nakkapúturnar kunnu stillast, el-síðuspegl við varma, servostýring, elektroniska startsperru, fjarstýrt sentrallás, el-síðurútar framman, flúgvaraborð á baksíðuni á framsetrinum, pollenfiltur, stýring til radio er í rættinum. Bilurin vit royndarkoyrdu hevði aircondition. Eisini fylgir ein original innkeypstaska á hjólum við í keypinum.

Tey sum hava hug at fara á eina Picasso framsýning, kunnu støkka inn á gólvið hjá bilasøluni, Ivan Johansen Bilar Sp/f. Bíligasta útgávan kostar kr.169.000,-



## Citroën Xsara Picasso SX 1.8

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 1.8 l 4 syl. 16 V 115 hk |
| **Dekkstødd** | 185/65-15 |
| **Bremsur** | Skivur framman og trumlur aftan |
| **Stødd og vekt:** | |
| **Longd** | 427,6 cm |
| **Breidd** | 175,1 cm |
| **Hædd** | 163,7 cm |
| **Vekt** | 1250/1300 kg (alt eftir motorstødd) |
| **Prísur:** | kr. 189.000,- (metallak + kr.1700,-) |
| **Søluumboð:** | Ivan Johansen Bilar Sp/f<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>tel. 313666 |



